Country Sisters:

# Syngja allan country tónleik



*Myndatxt: Country Sisters fara um vikuskiftið at hava tvær konsertir í Føroyum. Onnur verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og hon verður á Hotel Føroyum í Havn*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í annaðkvøld og leygarkvøldið verða kekkisku Country Sisters á føroyskum palli. Tær vóna at hitta væluppløgdum áhoyrarum til tey bæði kvøldini í Fuglafirði og í Havn**

TILTAK
*Ingrid Bjarnastein*

– Vit eru komnar til Føroya, tí vit fingu eina innbjóðing frá okkara kekkiska vini her í Føroyum, Renatu Gaardbo, sigur Sonia, sum er leiðarin í bólkinum. Hon spælir eisini bass.

Bólkurin Country Sisters hevur verið til í fleiri ár, men henda manningin hevur spælt í hálvt triðja ár saman.

– Country tónleikur er væl umtóktur heima hjá okkum í Kekkia, og í Evropa sum heild. Her er bluegrass tónleikur ógvuliga væl umtóktur, so vit vóna at áhoyrararnir fara at taka væl ímóti okkum, sigur Sonia.

### Øll sløg

Country Sisters, sum komu til Føroya mánadagin, siga seg spæla øll sløg av countrytónleiki.

– Vit spæla nýmótans country tónleik, traditional, bluegrass. Stutt sagt alt. Vit vóna, at nógv fólk fara at koma at lurta, og um hetta eydnast væl, so koma vit aftur til Føroya, siga tær smílandi.

Bólkurin hevur ferðast nógv kring heimin. Mest í Evropa, men eisini hava tær verið á ferðum í Tailandi, Singapore og Avstraliu. Í fjør vitjaðu tær fimm country systrarnar í Grønlandi, og eisini er bólkurin javnan í Danmark.

Tær spæla á øll ljóðførini, uttan trummur, sjálvar. Trummurnar eru tiknar upp. So við á konsertini verður elektriskur gittari, akkustiskur gittari, violin, bassur, mandolin, munnharpa og annað.

– Vit spæla allar tvey ljóðføri í part, og allar mikrofonir og øll ljóðføri eru tráðleys, so vit kunnu ganga ímillum áhoyrararnar og geva teimum eitt gott upplivilsi.

Country Sisters komu til Føroya mánadagin, og um vikuskiftið eru tvær konsertir á skránni. Onnur í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og hin á Hotel Føroyum.

– Fólk hava bjóðað okkum nógva staðni runt í Føroyum, og vit hava vitjað nógv áhugaverd støð, siga tær.

– Vit gleða okkum til at spæla, og vit hopa, at ein væluppløgd áhoyrarafjøld møtir upp. Í Grønlandi vóru áhoyrararnir super, og vit hopa, at tað verður tað sama í Føroyum.

Country systrarnar skuldu annars bera føroyingum eina heilsan frá Heidi Hauge úr Noregi, sum var her í fjør. Tær hava júst verið í Noregi á eini konsertferð í tvær vikur, har tær hava spælt saman við Heidi Hauge og øðrum kendum countrytónleikarum.

Konsertirnar verða, sum sagt tvær í tali. Onnur á Hotel Føroyum í Havn, og hin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tað er eisini Mentanarhúsið í Fuglafirði, sum hevur staðið fyri, at fáa bólkin til Føroya.

# Einans konufólk

**Fríggjakvøldið verður undirhald fyri allar pengarnar í Platform. Men bert um tú ert konufólk**

TILTAK
*Ingrid Bjarnastein*

Í morgin, fríggjakvøldið, verður eitt megnar konufólkakvøld í dansistaðnum Platform í Havn. Tí ein stóran part av kvøldinum sleppa bara konufólk inn, og eisini verður undirhald fyri allar pengarnar.

Latið verður upp klokkan 22, og tey konufólk, ið leita sær oman í Platform, fáa fyrst ein vælkomstdrykk at leska sær á við. Eisini verður ein stór eksotisk buffet, og lovar dansistaðið eisini, at ein eksotiskan dansara, at undirhalda.

Heri Jacobsen verður vertur, og heilt inntil klokkan 2 hava mannfólk onki at gera inni á Platform.

Eitt mótashow er eisini á skránni, sum hevur allan tann nýggjasta konufólkamótan.

Atgongumerkini kosta 100 krónur og kunnu longu keypast í forsølu. Við í prísinum er vælkomstdrykkurin, buffetin, diskotek og mótashow.



*Hesin kemur at syrgja fyri eksotiskum dansi fríggjakvøldið*




## Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta tín áhuga so ring ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 31 10 60

frants restorff



## Bygningur til sølu

Hervið verður goymslubygningurin, ið Sjóvar kommuna eigur á matr. nr. 367a í Langanesi á Strondum lýstur til sølu.

Bygningurin, ið er 375 $m^2$ til støddar, er bygdur í 1988.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Møguligt tilboð, ið skal vera í brævbjálva merktur goymslubygningur, skal verða Sjóvar kommunu í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2003.

Kommunustýrið skilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði.

**Sjóvar kommuna**
**490 Strendur**



## Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 15. mai 2003.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur við 2 stovum, 15 børn í hvørjari í aldrinum frá 3-7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevir
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi
- Dámar væl at vera úti í náttúruni

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønarstig 9.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Súsonnu á Stongum, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 23. apríl 2003.

**Barnagarðurin Sýslan**
FO-380 Sørvágur





Ford Motor Company
100 ár

Ford Focus Fakta:
1. Mest feilfríi samb. TVÜ kanning.
2. Mest seldi bilur í heiminum 2000/2001.
3. Ársins bilur 1999.
4. Kom á toppin við einum nýggjum Ford Focus.



## 100 ára jubileumstilboð!

**100 x 100 kr. avsláttur = 10.000 kr.**

| | |
|---|---|
| **Inkl. Metallakk** | **Bilurin er heilgalvaniseraður** |
| **Inkl. Radio við fløguspælara** | **12 ára rustgaranti** |
| **Inkl. Alufelgur** | **2 ára mekaniskan garanti** |
| **4 vetrardekk á felgum fyri ½ prís** | **Avmarkað nøgd á lagri** |

SJÓNBAND 317774

**Upplatingartíðir: Mánadag -Fríggjadag: 8.00 - 17.30 - Leygardag: 10.00 - 16.00**



**Jóhan Petur**
**tlf. 354508**



**Jógvan**
**tlf. 354505**



**Lennard**
**tlf. 354506**

Ford

**P/F Wenzel**

www.wenzel.fo, Akranesgøta 5, tlf. 354500.



## Frá Hósvíkar kommunu

Bygdaráðsfundurin ið lýstur er at vera mikudagin 16. apríl 2003, er fluttur til mikudagin 9. apríl 2003.

**Hósvíkar kommuna**



LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Útbjóðing av lastbilaflutningi

Flutningur av skervi og sandi millum bryggjuna á Langasandi og grótbrotið í Hundsarabotni, verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegi 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir fáast útflýggjað.

Licitatiónin verður hjá Landsverkfrøðinginum 22. apríl, kl. 13.00.

**Landsverkfrøðingurin**



Sosialurin
-tað loysir seg